# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10/00205 | Lóg: Skattalógin § 60, § 62 | Avgerð tikin: 23.06.2011 |
|---|---|---|

## Spurningurin um inntøka er A-inntøka er lagdur til Toll- og Skattaráð Føroya at taka avgerð um.

**Samandráttur:**

**Skatta- og avgjaldskærunevndin vísti frá sær kæru um, at TAKS vildi ikki rokna pensjónsinntøku frá PFA í Danmark sum A-inntøku. Avgerðin verður grundað við, at spurningurin, um ein inntøka kann roknast sum A-inntøka ella ikki, er lagdur til Toll- og skattaráð Føroya at taka avgerð um, og kann avgerð ráðsins kærast til landsstýrið. Soleiðis hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin ikki heimild at viðgera hetta málið.**

### Avgerð

Upplýst er í málinum, at A hevur kært um, at TAKS vil ikki rokna pensjónsinntøku frá PFA í Danmark sum A-inntøku.

**TAKS** vísir m.a. á, at tey hava móttikið teldupost frá A, har hann biður um at blíva skrásettur við v-tali til sjálvbodna lønarávísing.

TAKS greiðir frá, at uttanlandseftirløn verður roknað sum B-inntøka. Tí skrásetir TAKS ikki longur v-tøl til ávísing av uttanlandseftirlønum.

Hinvegin eigur kærarin við ársbyrjan at lata inn fyribilsskattaskrá, har hann upplýsir, hvussu stóra upphædd hann fær í eftirløn úr útlondum, umframt aðra væntaða inntøku.

Væntaði skattur hansara fyri árið verður so útroknaður, og hann fær inngjaldingarkort sendandi at gjalda væntaða skattin við. Tá árið er liðugt, verður endaligi skatturin útroknaður.

**Kærarin A** vísir m.a. á, at málið snýr seg um at fáa eina pensjónsinntøku frá PFA í Danmark skrásetta í Føroyum sum A-inntøka - eins og praksis hevur verið í fleiri ár higartil, har eitt sertal (V-tal) hevur verið loysnin.

Men hesum sigur TAKS seg ikki ganga á møti longur, og at tað kann kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina, sum so eigur síðsta orðið.

Hann greiðir frá, at upprunaliga var gjørt eitt umfatandi arbeiði til tess at fáa so nógva inntøku/lønarinntøku sum gjørligt ígjøgnum A-skattaskipanina, t.d. frá FPA, PKA og í veruleikanum til frama fyri allar partar.

Hann vísir á, at TAKS sigur í skrivi frá 23. august 2010, at uttanlands eftirløn verður roknað sum B-inntøka, og at “umsókn um sertal ikki játtað”.

Upp á telefonfyrispurning 20. august 2010 segði TAKS, at tað var ikki tí, at skrásetingin av sertali gav teimum nakað eykað arbeiði – og so legði TAKS doyðin á, at hann kortini skuldi senda inn sjálvuppgávu.

Hartil er bert at siga, at tað er frægari at skula lata inn sjálvuppgávu við árslok heldur enn eisini at skula renna runt við øllum øðrum so sum fyribilsskattaskrá, girokortum, gjaldingum eina ferð pr. mðr. – ja, hetta er fyri sokallaðar pensjónistar, sum ikki allar ævir “koyra í 5. geari”. Kann tað ikki gerast smartari, jú sjálvsagt.

Viðmerkjast kann, at júst eisini slíkar inntøkur vóru skjótar at gloyma. Hesar eru sjálvandi enn í sama bólki, og neyvan slepst undan við ellisárunum at gloyma bæði fyribilsskattaskrá, girokort og sjálvuppgávu. So tað snýr seg eisini um at vera praktiskur/gagnligur.

Harafturat so gevur tað heldur onga pragmatiska meining, at slíkir persónar skulu senda inn sjálvuppgávu fram um nakrar aðrar, tí ein pensjón frá Tryggingarsambandinum og ein pensjón frá PFA kunnu fult og heilt í hesum høpi javnsetast við A-inntøkur. Tær eru bert frá hvør sínum “arbeiðsgevara” í sama (ríkis)felagsskapi og við sama teldukervi.

Tað ræður um smidligar skipanir og loysnir (eisini ódýrar) – har inntøkan “automatiskt” verður skattað beinanvegin, sum øllum dámar best innast inni.

Tað er neyvan lógarbrot at broyta avgerðina til at vera A-inntøku. Á netinum/heimasíðuni hjá TAKS ber eisini til at skatta PFA-pensjón (danska eftirløn) sum A-inntøku – og tað má vera eitt mál í sjálvum sær.

Hann mælir til at broyta PFA-pensjónina til A-inntøku.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin** viðmerkti, at kært er um, at TAKS ikki vil skráseta pensjónsinntøku frá PFA í Danmark sum A-inntøku.

Í § 60 í skattalógini verður nevnt, hvat slag av veitingum verða roknaðar sum A-inntøkur, og í § 61 eru nevndar veitingar, sum ikki skulu roknast sum A-inntøkur. Sambært § 62 í skattalógini kann landsstýrismaðurin í skattamálum, tá serligar grundir eru til tess, gera av, at ein ávís inntøka ella eitt ávíst slag av inntøkum, sum koma undir 60. §, 1. stk., ikki skulu verða A-inntøkur.

Sambært § 62, stk. 2 ger Toll- og skattaráðið í øllum ivamálum av, um ein inntøka er A-inntøka. Avgerð Toll- og skattaráðsins kann kærast til landsstýrið.

Tað er soleiðis Toll- og skattaráð Føroya, sum skal taka støðu, um ivamál er, um inntøka er A-inntøka ella ikki.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørdi at vísa málinum frá sær.**

**Avgerðin verður grundað við, at spurningurin, um ein inntøka kann roknast sum A-inntøka ella ikki, er løgd til Toll- og skattaráð Føroya at taka avgerð um, og kann avgerð ráðsins kærast til landsstýrið. Soleiðis hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin ikki heimild at viðgera hetta málið.**